Sum nýtt stk. 2 í § 3 verður sett:

Til at leggja upp fyri týðandi náttúruvirðum skulu linjuføringar sambært stk. 1, nr. 1, 3 og 5, og staðseting av arbeiðsøkjum og avlopsgróti fyrireikast og prosjekterast í samráð við náttúrufyrisitingina á Umhvørvisstovuni.

Verandi stk. 2 gerst stk. 3

Umhvørvisstovan viðger í løtuni fleiri mál um økisvernd, har tvey kunnu hugsast at verða ávirkað av verkætlanini um Suðuroyartunnilin:

1. Skúvoy

2. Eitt størri samanhangandi øki kring vøtnini á Sandi, sum sannlíkt fer at fevna um Stóra og Lítla vatn, Sandsvatn, Gróthúsvatn, Søltuvík og Norðara og Heimara hálsavatn

Aftur at hesum eru sannlíkt áhugaverd djóra- og plantuøkir nær byggilinjunum í Hvalba, hóast einki mál um økisvernd er í gongd.

Tað er lítil ivi um, at ein verkætlan av hesum slag, uttan mun til hvar hon er staðsett, fer at hava ávirkan á náttúruna í nærumhvørvinum. Tað er týðandi at tryggja, at árinini á serlig náttúruvirðir verða so lítil sum gjørligt.

Til at leggja upp fyri týðandi náttúruvirðum verður sett inn sum nýtt stk.2 í § 3, at linjuføringar sambært § 3, stk. 1, nr. 1, 3 og 5, og staðseting av arbeiðsøkjum og avlopsgróti skulu fyrireikast og prosjekterast í samráð við náttúrufyrisitingina á Umhvørvisstovuni. Á henda hátt fær Umhvørvisstovan høvi at gera greiðu fyri týðandi náttúruvirðum, og støða kann takast til møguligar tillagingar, har ið tað er fíggjarliga og tøkniliga ráðiligt.

Til at verja náttúrumargfeldið í Føroyum kunnu verndarøki verða skipað við heimild í náttúruverndarlógini. Eitt verndarøki fær eina løgfrøðiliga støðu, sum tryggjar serliga virðismikla náttúru fyri eftirtíðina. Verndarøki eru við til at verja djóra- og plantusløg og náttúrusløg og vistskipanir og kunnu eisini hava týdning fyri útilív og mentanararv.